# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Sjórænararnir hava tømt skipið, og teir tóku eisini alt, sum manningin átti umborð*

*(Jørgen Folmer, reiðari á Danica White)*

# Hóttu við at selja donsku sjómenninar

**Sambært einum somaliskum felagsskapi hóttu burturflytararnir við at selja manningina á Danica White, fingu teir ikki loysigjald**



*Fakfelagið hjá manningini á Danica White fer at reisa krav um endurgjald til manningina*

Teir somalisku sjórænararnir, sum rændu danska farmaskipið Danica White og manningina fyri næstan trimum mánaðum síðani, hóttu við at lata yvirgangsfelagsskapin al-Qaeda fáa manning og skip. Tað sigur ein somaliskur felagsskapur í Danmark, sum eisini vil vera við, at tað var hendan hóttanin, sum at enda fekk reiðaríið at rinda loysigjald í gjár, so manningin slapp leys.

Hans Tino Hansen hjá felagnum Protocol hevur drúgvar royndir frá samráðingum við sjórænarar, og hann hevur eisini verið uppi í málinum um Danica White. Hann heldur tó ikki, at hóttanin um at selja al-Qaeda skip og manning skal takast í fullum álvara.

- Vit vita, at al-Qaeda hevur havt eina deild í somaliska høvuðsstaðnum Mogadishu, men hon hevur verið illa kroyst í seinastuni, so hetta hevur neyvan havt nakað upp á seg, sigur Hans Tino Hansen við danska útvarpið.

Reiðarin á Danica White, Jørgen Folmer, vil ikki siga, hvussu nógv sjórænararnir fingu í loysigjaldi. Hann fegnast um, at manningin er latin leys. Hinvegin hevur hann ikki so nógv at fegnast um, tá tað snýr seg um sjálvt skipið, tí hann hevur fingið at vita, at sjórænararnir eru farnir við øllum, sum hevði nakað virði.

### Fakfelag misnøgt

Danska sjómannafelagið hevur boðað frá, at tað fer ikki at sleppa málinum um Danica White. Felagið fer nú at fyrireika endurgjaldskrøv ímóti reiðarínum, tryggingarfelagnum hjá reiðarínum og uttanríkisráðnum í Keypmannahavn.

Felagið hevur boðað frá, at tað er sera misnøgt við, hvussu teir ymsu partarnir hava handfarið sjóránið. Í samrøðu við DR í gjárkvøldið spurdi eitt umboð fyri fakfelagið hjá sjómonnunum, um uttanríkisráðið hevði brúkt somu mannagongd, um ein bussur við donskum ferðafólkum bleiv rændur í eitt nú Turkalandi. Sjálvur helt hann, at uttanríkisráðið og reiðaríið hjá Danica White hava víst manningini ógvuliga lítla virðing seinastu næstan tríggjar mánaðarnar.

# Týskir ferðamenn horvnir í Íslandi

**Síðani ólavsøkudag hevur eingin borið eyga við teir báðar týsku ferðamenninar**



*Thomas Grundt*



*Mathias Hinz*

Tann 24 ára gamli Thomas Grundt og tann 29 ára gamli Mathias Hinz gistu á einum tjaldingarplássi í Laugardali í Reykjavík til tann 29. juli, men síðani hevur eingin sæð nakað til teirra. Teir høvdu ferðaseðlar við flogfari úr Íslandi seinasta vikuskiftið, men teir komu ikki á flogvøllin, skrivar Morgunblaðið.

Íslendska løgreglan, bjargingartænastan og bjargingarfeløg hava teir seinastu dagarnar leitað eftir teimum báðum týsku ferðamonnunum. Løgreglan hevur fingið at vita, at teir plaga at ferðast ímillum høg fjøll, og tí er leitingin miðsavnað í fjallalendinum. Seinasta vikuskiftið leitaði ein tyrla hjá sjóverjuni á leiðini við Vatnajøkul, og síðani hava bjargingarfeløg leitað ymsastaðni á Suðureysturlandinum, men higartil uttan úrslit.

Alt rør- og ventilatiónsarbeiði verður gjørt **skjótt** og **væl**



**MST-RØR** Tel. 507003

## STUTT SAGT

### Flýggja úr Pisco

Tann harði jarðskjálvtin, sum var í Peru í síðstu viku, gjørdi serliga stóran skaða í býnum Pisco, og tað hevur fingið fólk í túsundatali at rýma úr býnum. Peruanska stjórnin sigur, at meiri enn 50.000 fólk eru rýmd úr Pisco við øllum, sum tey eiga. Tað svarar til umleið 40 prosent av fólkinum í býnum, tí undan jarðskjálvtanum búðu umleið 130.000 fólk í Pisco. Men mong teirra eru heimleys í dag, tí sambært myndugleikunum eru 85 prosent av húsunum í býnum javnað við jørðina.

### Ímóti fólkaatkvøðu

Bretski forsætisráðharrin, Gordon Brown, er ímóti at hava fólkaatkvøðu um ta nýggju ES-grundlógina, sum ríkis- og stjórnarleiðararnir samdust um í summar. Bretska Parlamentið hevur fyrr samtykt, at tað er ikki neyðugt at lata bretsku veljararnar taka støðu til nýggju lógina, men at Parlamentið kann taka avgerðina, og hesum tekur Gordon Brown undir við. Bretsku fakfeløgini skulu hava fund 10. september, og tá fara tey væntandi at krevja fólkaatkvøðu um ES-grundlógina.

### Sleppa ov lætt

Nógvir danir halda, at teir nógvu eysturevropeararnir, sum eru komnir til Danmarkar at arbeiða, gjalda ov lítlan skatt. Danska lóggávan ger, at menninir kunnu draga útreiðslur til mat og innivist frá, og sambært Vinnuráðnum er úrslitið, at nógvir eysturevropear rinda bara millum 8 og 12 prosent í skatti. Kristian Jensen, skattamálaráðharri, hevur tó ongar ætlanir um at broyta frádráttarskipanina, skrivar Ritzau.